FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Postboks 208
110 Tórshavn

Stjórnarskrivstovan
17. mars 2021
Mál: 21/00106-3
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-101/2020

Svar til § 52 a fyrispurning nr. 52-101/2020 frá Beini Johannesen, løgtingsmanni

Fyrispurningur um landingar uttanlands, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu oftani hevur undantak verið givið fyri landingum uttanlands í lógini um sjófeingi, og í hvørjum førum?

2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at broyta lógarásetingina í lógini um sjófeingi, viðvíkjandi landingum?

3. Um ja, hevur landsstýrismaðurin ætlanir um, at tað verður lógarfest, hvussu nógv kann landast uttanlands?

Svar:

Til spurning 1.
Í fýra førum er undantak givið at loyva skipum at landa fong uttanlands.

Í tveimum førum hevur verið talan um at landa frystan svartkjaft og norðhavssild, tí at frystigoymslurnar í Føroyum at kalla vóru fullar.

Í einum føri er undantak givið at landa frystan botnfisk í Íslandi, tí kvotan hjá skipinum var 50 tons størri, enn hvat skipið tekur. Loyvi varð givið at landa 75 tons í íslendskari havn við tí treyt, at fiskurin varð fluttur til Føroyar at verða seldur.

Í einum føri er loyvi givið at landa feskan svartkjaft uttanlands, tí ein maður var komin til skaða umborð og skuldi undir læknahond skjótast gjørligt.

Umframt beinleiðis undantøk eftir umsókn var kunngerðin um landing í Føroyum á vári 2020 broytt, so loyvt varð at landa svartkjaft uttanlands í tíðarskeiðinum frá 11. mars til 15. juni 2020. Grundgevingarnar fyri hesi broyting vóru, at vantandi móttøkuorka á landi í Føroyum gjørdi, at føroysku svartkjaftaskipini vóru noydd at bíða eftir landingartørni, tá

svartkjaftafiskiskapurin var í hæddini, umframt at tann vantandi framleiðsluorkan forðaði fyri skjótari gagnnýtslu av føroysku svartkjaftakvotuni.

Til spurning 2.
Reglurnar, sum eru ásettar í sjófeingislógini, eru gjørdar við støði í orðingunum í samgonguskjalinum: "Allur fiskur skal um føroyskan kaikant. Tó skal undantak vera fyri fjarfiskiskap, har umstøður so sum góðska og/ella kostnaður tala fyri tí, og fyri fiskiskap, har móttøkukapasiteturin í Føroyum er avmarkaður. Eisini um serligar umstøður gera seg gjaldandi, skal vera møguligt at fáa undantak."

Í sambandi við politiskar tingingar um tilfeingisgjøld hevur verið frammi, at hóskandi kann vera at gera nakrar broytingar í verandi skipan, so heimilað verður skipum, uttan at skula søkja í hvørjum einstøkum føri, at landa ein part av síni veiði uttan fyri Føroyar, so kapping verður um avreiðingarnar, og at tað á tann hátt fæst eitt haldgott grundarlag fyri, at avreiðingarprísirnir í Føroyum eru á støði við galdandi marknaðarprísir.

Til spurning 3.
Víst verður til svarið til spurning 2 omanfyri. Støða er ikki tikin til, um møguligar broytingar verða gjørdar við kunngerð, ella um lógarbroyting er neyðug ella meir hóskandi.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður